# Ongar vánaligar umberingar í uppsagnarmálum

Tveir dómar í Danmark hava staðfest, at sparingar eru ikki haldgóð orsøk til at siga barnakonum úr starvi, um til ber at finna kvinnunum annað starv á arbeiðsplássinum, til dømis í aðrari deild. Tað er fakfelagið HK, Handel & Kontor, sum hevur fingið viðhald í teimum málum, har kvinnur vórðu sagdar úr starvi, meðan tær vóru við barn. - Tað ber ikki til at siga einari kvinnu úr starvi, um til ber at seta hana í annað starv í fyritøkuni, sum hon hevur førleika til, sigur Mette Kindberg, næstforkvinna í HK.



# Stórreiðari burturfluttur

Grikski stórreiðarin og ríkmaðurin Pericles Panagopoulos var á veg til arbeiðis í Athen í gjár, tá tríggir vápnaðir menn við gekkaskorti steðgaðu honum og fóru av stað við honum. The Times skrivar, at burturflytararnir vilja 40 milliónir evrur ella næstan 300 milliónir krónur í loysigjaldi. Summir eygleiðarar í Athen halda, at burturflytingin kann vera politisk, og at tað er onkur víðgongdur bólkur á vinstravonginum, sum hevur burturflutt tann 74 ára gamla stórreiðaran. Men grikska løgreglan heldur, at talan er um vanligar brotsmenn, sum hava brúk fyri pengum.




svimjing er ein einstaklingagrein. Men vinnulív og gransking (sum í dag hanga neyvt saman) hevur ikki stórvegis av greinum fyri einstaklingar á altjóða pallinum. Har finnast at kalla bert greinar fyri lið. Avbjóðingin er tað størri.

Kravið til eina strategiska ætlan er tí, at hon í størsta mun er metodu-grundað og í minni mun virkis-grundað. Vit skulu menna arbeiðshættir og velja, hvørjar arbeiðshættir vit vilja leggja okkum eftir. Virkisøkini verða í stóran mun vald eftir, hvar initiativ og framtakshugur vísa seg í verki.

Tey góðu tíðindini í tí sambandi eru, at við einum rímiligum vilja frá hægsta stað ber til at brúka kend amboð, sum bæði eru teoretiskt grundað og roynd. Vit vita eisini fyri vist, at tær strategisku læruprosessirnar fáast einans við at virka ígjøgnum ítøkilig prosjekt. Vit vita eisini, at neyðugt er at byggja á prosjekt, sum longu eru komin nakað áleiðis, skal skjøtil fáast á og nøkur úrslit hómast innanfyri bert rímiligt áramál.

**Eitt møguleikans ár**

2009 er í mangar mátar eitt møguleikans ár. Kann vera, at stígur kemur í búskapin – ella beinleiðis niðurgongd og kreppa. Kann vera, at møguleikarnir at dusa sær í jøvnum vøkstri minka. Kann vera, at tað kemur at standa á gomlum nøglum. Men við eini búskaparligari støðu, har okkum ikki nýtist at steðga upp eftir einum ári ella tveimum, eigur at bera væl til at avgreiða kreppuspurningin eftir stuttari tíð og brúka tær somu læruprosessirnar til at leggja strategiskar lunnar av nýggjum – eisini uttan at bróta niður enn fleiri gamlar lunnar. Hóast nógv ókvæmisorð og hóast tíðin er um at fara frá teimum, hava teir fáu gomlu lunnar, sum eftir eru, borið okkum ígjøgnum tey seinastu 20 árini eisini.